**Handilsskúlin**

*Lærugreinakunngerð* *mai 2003*

***Uppskot***
**Virkisbúskapur**
**B-stig**

*Endamálið*

**1.** Endamálið er, at næmingurin lærir at nýta virkisbúskaparligar fyrimyndir og arbeiðshættir og at skilja hugsunarháttin og ástøðið undir teimum. Harafturat skal hann duga at greina fyriskipanarligan bygnað, funktiónir, prosessir og mentan, og sambandið við umheimin. Næmingurin skal duga at meta um búskaparligar avleiðingar av uppsettum valkostum, gera einfaldar búskaparligar frágreiðingar og greina einfaldar innanvirkis og uttanvirkis búskaparligar frágreiðingar. Í lærugreinini skal næmingurin menna evni síni at lýsa og leggja fram avrik um virkisbúskaparlig viðurskifti. Í hesum sambandi skal hann duga at skilja og nýta virkisbúskaparligt føroyskt fakmál, og duga at skilja danskt og enskt fakmál.

*Undirvísingin*

**2.1.** Í undirvísingini verður havt fyri eyga, at
1. heildarfatan er gjøgnumgangandi tráður í undirvísingini.
2. teldan er natúrligt amboð í undirvísingini.
3. virkisbúskapur á B-stigi er framhald av Virkisbúskapi á C-stigi og grundarlag undir Virkisbúskapi á A-stigi, Ársroknskapi á A-stigi, Fyriskipan á A-stigi og partvíst Sølubúskapi á A-stigi.
4. samstarvað verður við aðrar lærugreinir, serliga Sølubúskap á B-stigi, um lærugreinin er partur av samlaðari HH-útbúgving.
5. viðkomandi framløguhættir verða nýttir í undirvísingini.
6. kontoskipanirnar, ið liggja sum skjal til hesa lærugreinakunngerð, kunnu verða nýttar sum fyrimynd í undirvísingini, men kontoskipanin verður lagað eftir tí virki, sum arbeitt verður við.
7. føroyskt mál verður brúkt fyri virkisbúskaparlig hugtøk. Í samstarvi við lærugreinirnar danskt og enskt kunnu hugtøkini eisini verða lýst á hesum málum.

**2.2** Skrivligi tátturin í lærugreinini fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum. Skrivliga arbeiðið fevnir um einar 12 uppgávur, her í millum tvørfakligar uppgávur, sum í vavi svara til próvtøkuuppgávur, og sum lærarin rættar og ger viðmerkingar til. Skrivliga arbeiðið eigur at vera eitt natúrligt framhald av dagliga arbeiðinum við evnunum, ið nevnd eru undir pkt. 3.1 – 3.7, og skal hjálpa næmingunum at fáa eina djúpari fatan av høvuðsspurningunum í lærugreinini.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1.** *Virkið sum búskaparlig eind*
- Búskaparhugtakið: Búskapur og virkisbúskapur.
- Virkissløg: Handilsvirki, framleiðsluvirki, tænastuvirki.
- Ognarviðurskifti: Einstaklingsvirki, íognarfeløg, partafeløg, smápartafeløg
- Hugsjónar- og tilverugrundarlagið: Hví verður farið undir vinnuligt virksemi?
- Virkið og umheimurin: Ávirkingarbólkar nær og fjar, lógir, reglur og siðvenjur.

**3.2.** *Funktónir í virkinum*
- Keypsfunktiónin og goymslufunktiónin: Goymslustýring, tænastustig og pengabinding.

- Framleiðslufunktiónin: Framleiðslufaktorar, lutfalslógin (proportiónslógin), framleidni og effektivitetur, samlag, substitutión, framleiðsluformar, framleiðslustýring, netverk, gannt-talvur.
- Sølufunktiónin: Marknaðarrøkt, ávirkingarparametrar, vørumenning, sølubúskapur.
- Fyrisitingarfunktiónin: Leiðsla, samskipan av funktiónunum, búskparlig stýring, starvsfólkamál, starvsfólkatilfeingi, samskifti.

3.3. *Virkið sum fyriskipan*

- Virkið sum heildarskipan: Fyriskipanarhugtakið, skipanarteoriin, umskapanartilgongdin, fyriskipanarhættir, klassisk og nýggjari teori innan fyriskipan.
- Formlig fyriskipan: Arbeiðsbýti, myndugleika- og ábyrgdarbýti, samskipan, formligar forskriftir
- Prosessir: Samskifti, eftirlit, stýris- og avgerðartilgondir, avgerðargongdin.
- Virkismentan: Orsøkir til virkismentanina, einstaklingsmentan, flokkamentan, broytingar í virkismentanini.
- Óformlig fyriskipan.
- Leiðsla: Leiðsluhættir, menniskjaáskoðan, leiðsluhættir.

3.4. *Kostnaðarlæra og marknaður*

- Kostnaðarlæra: Fastur kostnaður, broytiligur kostnaður, allur rakstrarkostnaður, eindarkostnaðir, markkostnaður, munareindarkostnaður.
- Inntøka: Eftirspurningur, prísviðkvæmi, markinntøka, munareindarinntøka, sambandið millum prísviðkvæmi og markinntøku.
- Marknaður: Fullkomin kapping, monopol, ófullkomin kapping, skiftispunkt.
- Kostnaðarhugtakið: Kostnaður og útreiðslur, nýtsludefinitiónin, offurdefinitiónin, beinleiðis og óbeinleiðis kostnaður, kostnaður og teknikkurin, kostnaður og tíðin.
- Kostnaðarbýti: Kostnaðarbýti eftir skiftisháttinum, kunnað verður um fult kostnaðarbýti.

3.5. *Bókhald og ársroknskapur*

- Handilsvirki og framleiðsluvirki.
- Einstaklingsvirki, íognarfeløg, partafeløg.
- Dupulti bókhaldshátturin
- Bókhaldsskjøl
- Kontobygnaður: slagbýttur og funktiónsbýttur
- Dagligar bókingar: Vøruroknskapur, løn og annar kostnaður, roknskapur við tøkum peningi.
- Grundleggjandi roknskaparhugtøk: Going concern, sambæri, tíðaravmarking, varsemi, týdningur.
- Virðismetingar: Støðisogn og avskriving, vørugoymslur, skuldarar, kostnaður goldin frammanundan, skyldigur kostnaður, skyldig løn.
- Roknskaparuppgerð og –uppseting.

3.6. *Roknskapargreining*

- Rakstrarlig renting: Ognaravkast, rakstraravkast, ognarumferð, bruttoavkast, skiftisavkast, skiftislutfall, støðisognarumferð, vøruskuldaraumferð, goymsluumferð, vøruognaraumferð, vísitøl.
- Íløgurenting hjá eigarum: Eginpeningsavkast, skuldarrenta, ognaravkast.
- Gjaldføri: Arbeiðspeningslutfall, gjaldførislutfall.
- Pengastreymsuppgerð

3.7. *Fíggjarætling*

- Endamál og mannagongd
- Heildarætlan

- Rakstraræ tlan
- Gjaldførisætlan eftir virðisbroytingarháttinum
- Fíggjarstøðuætlan

**4.** Lisnar verða tilsamans einar 400 síður, treytað av valda tilfarinum.

*Próvtøka*

**5.** Hildin verður ein skrivlig próvtøka.

**6.1** Skrivliga próvtøkan varir 4 tímar. Próvtakararnir fáa eitt ella fleiri stakdømi, sum skulu loysast, umframt møguliga smærri ískoytisuppgávur av ástøðiligum slagi.

**6.2** Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin dugir at nýta tey fakligu amboðini neyvt og rætt í viðgerðini av stakdømunum, eins og at próvtakarin dugir at lýsa, greina og meta um virkisbúskaparligar tættir, ið eru til staðar í stakdømunum. Annars verður víst til endamálsorðingina fyri lærugreinina undir **1**. Herumframt skulu svørini vera væl og greitt skipað.

**6.3** Til próvtøkuna er tað loyvt próvtakaranum at hava allar hjálparmiðlar við, ið hava verið nýttir í undirvísingini.

**7.** Givið verður 1 próvtal við støði í einari heildarmeting.